## Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# 100 ÁRA STRÍÐ ER NÓG MIKIÐ

Stríðið um stjórnarskipan Føroyar hevur fylgt alt ov nógv í føroyskum politikki gjøgnum árini – og tað hevur so mangan verið orsøk til, at tað ikki ber til at finna skilagóðar politiskar loysnir.

Tá eitt land stríðist í meira enn hundrað ár um, hvørja skipan vit skulu hava við Danmark, og tá allir flokkar á tingi uttan Javnaðarflokkurin og Miðflokkurin eru sprotnir beinleiðis úr stríðinum um sambandið við Danmark, so sigur tað okkum, at her má okkurt fáast upp á pláss.

Arbeiðið í stjórnarskipanarnevndini tykist bera á tað borðið, at ein tjóðarsemja fyri einaferðskuld er at hóma. Hetta er áhugavert í sær sjálvum. Men nú tykist vargur at vera komin í – og sum ikki einaferð, so eru tað føroyingar sjálvir sum klutra málið – og í hesum førum draga tað upp í danskan politikk.

Tað er ein sjálvfylgja, at tað eru føroyingar sjálvir, sum skulu siga, hvat vit vilja. Tað eru vit, sum skulu gera av, hvussu framtíðar viðurskifti okkara skulu vera við Danmark. Hetta hava fleiri forsætisráðharrar sagt – og hetta segði Lars Løkke Rasmussen eisini í samráðnum í gjár. Hetta undirstrikar, at danir – alment í øllum førum – ikki fara at leggja seg út í, hvørja stjórnarstøðu føroyingar fara at velja sær. Tað er eisini soleiðis, at tað skal vera. Spell at so lítið forstáilsi er fyri føroyskum politikki í Danmark, har hann verður viðgjørdur av donskum politikarum og donskum fjølmiðlafólkum, sum lítið og einki innlit hava í føroyskan politikk og føroysk viðurskifti sum heild.

Tað er valla tann sama breiða semjan um framtíðar sambandið við Danmark. Men tað sum hevur týdning við hesum arbeiði, sum nú fer fram, er at vit leggja stjórnarskipanartilgongdina til rættis, so vit eru samd um, hvussu broytingar verða gjørdar. Tí broytingar verða gjørdar, broytingar, sum gera Føroyar alsamt meira sjálvstøðugar.

Hjá teimum flestu er loysing frá Danmark einki endamál í sær sjálvum. Loysingin er hugsjónin



hjá einum flokki. Sambandið er hugsjónin hjá einum øðrum flokki.

Men tann størsti parturin av Føroya fólki tekur undir við eini skipan, sum alsamt flytur meira vald til Føroya. Ein fólkaatkvøða um loysing hevði helst fallið við einum braki. Loysingin er bara ein av fleiri avleiðingum av framtíðar stjórnarskipanini, sum kann koma. Tað, sum hevur týdning er, at vit fáa eina stjórnarskipan, sum allir føroyingar kunnu kenna sum sína, so vit ikki eisini brúka næstu hundrað árini til destruktivt kjak um loysing og samband.

**Loysing frá Danmark einki endamál í sær sjálvum**

# Klintrimús við skúlatasku




Fríggjadagin hugleiða Klintrimús og Mikkjal revur um skúlataskuna.

Øll, sum fara í fyrsta flokk eftir summarfrítíðina hava nú høvi at fara í bókhandilin Rit & Rák í SMS í Havn at hoyra fysioterapeut greiða frá, hvat ein góð skúlataska er, og hvussu taskan eigur at verða brúkt.

Henda stevna verður í Rit & Rák fríggjadagin 18. juni millum klokkan 16.30 og 17.30, ein tíma, og ein tíma leygardagin 19. juni, frá klokkan 11 til 12.

Í sambandi við tiltakið fara Klintrimús og Mikkjal revur úr Valbakkaskóginum at hjálpa til.

Áðrenn tiltakið fríggjadagin verða skúlataskur burturlutaðar, og leygardagin verða barnabøkur burturlutaðar.



**Takk til herin í Suðurafrika**

NJÁL DJURHUUS
KJAK Á SÍÐU 16



**Einki at siga til at samkynd rýma**

ANNIKA VANG
KJAK Á SÍÐU 25

# Petur Holm loystur úr starvi

Tað kom nærmast sum ein bumba stutt undan miðdegi, at stjórin á Smyril Line seinastu tvey árini, Peter Holm, er loystur úr starvi.

Tað hevur annars verið ein sólskinssøga í føroyskum handilslívi, at Smyril Line hevur vent gongdini frá at bara hóra undan, til at geva eitt sunt yvirskot. Tí kemur tað helst óvart á mong, at Peter Holm ikki longur skal stýra skútuni Smyril Line.

Og enn meiri undrunnarvert verður tað, tá nevndarformaðurin, Klaus Kjærulff, einki annað hevur at bera fráfarandi stjóranum, enn lovorð.

– Tað er »uttan dramatikk« at stjóraskiftið fer fram, og vit skiljast í sátt og semju, sigur Klaus Kjærulff og undirstrikar, at Peter Holm hevur verið dugnaligur sum stjóri og hevur gjørt eitt gott arbeiði fyri Smyil Line.

Um orsøkina til, at Peter Holm nú fer frá sum stjóri, sigur Klaus Kjærulff, at tað er ein søk millum nevndina og fráfarandi stjóran.

– Samstarvið millum nevndina og Peter Holm hevur altíð verið gott, og vit skiljast í sátt og semju, leggur nevndarformaðurin dent á.

Hann sigur, at felagið byggir víðari á tað arbeiði, sum Peter Holm hevur gjørt, men at tað altso verður við einum nýggjum stjóra, sum fyribils verður Rúni Poulsen, inntil nýggjur stjóri er settur. Og nær tað verður, dugir Klaus Kjærulff ikki at siga í løtuni.



**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*